# Fólkið vil broytingar

Javnaðarflokkurin vil samstarv og loysnir. Broytingar eru neyðugar. Fólkið vil broytingar, men ikki kvetta á stokkinum. Og júst hetta er støðan hjá Javnaðarflokkinum.

Loysingarætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum er koyrd føst. Tað var stívrendi afturhaldspolitikkurin hjá Sambandsflokkinum, sum var orsøkin til, at loysingarætlanin yvirhøvur kom í eyga.

Nú uppundir fólkatingsvalið heldur Sambandsflokkurin fram við sínum afturhaldspolitikki og Tjóðveldisflokkurin við sínum konfrontatiónspolitikki.

Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkin er einasti møguleikin at vinna eina veruliga, virðiliga og varandi loysn á ríkisrættarspurninginum. Pólarnir í sjálvstýrisspurninginum, Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin, fara ongantíð at megna at fáa eina breiða undirtøku fyri teirra loysn.

# Javnaðarflokkurin tryggjaði bankaavtaluna

Tað var ein fundur millum føroyska og danska Javnaðarflokkin, sum legði grundina undir úrslitið av bankaavtaluni millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina

Bankaavtaluna frá 10. juni 1998 var eitt beinleiðis úrslit av fundi, sum Jóannes Eidesgaard og Marita Petersen høvdu við leiðsluna í danska Javnaðarflokkinum 19. mars 1998, beint eftir fólkatingsvalið.

Á hesum fundi gjørdu føroysku umboðini greitt, at vit høvdu møguleika at fella stjórnina, vildi hon ikki gera eina avtalu um endurgjald fyri bankamálið og finna eina virðiliga loysn á skuldarspurninginum millum Føroyar og Danmark. Úrslitið av hesum fundi var, at Poul Nyrup Rasmussen gav lyfti um, at danska stjórnin »snarest muligt vil være rede til at forhandle en løsning på banksagen med kompensation til Færøerne«, og »at den danske regering i de kommende forhandlinger vil bestræbe sig på at finde frem til en aftale om gældsafviklingen, der tager hensyn til det færøske samfunds bærekraft og befolkingens velfærd«.

Tað var tískil Javnaðarflokkurin – og hvørki samgongan hjá Anfinni Kallsberg ella fólkatingsmaðurin hjá Fólkaflokkinum – sum tryggjaði Føroyum góðu bankaavtaluna. Javnaðarflokkurin fekk bankaavtaluna undir land, og eftir var bert hjá Anfinni Kallsberg at skriva undir.

Bankakanningin var sakliga dokumentatiónin fyri at fáa endurgjald. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin atkvøddu ímóti hesi kanning. Teir vildu heldur hava eina dómarakanning, sum ikki hevði verið gjøgnumførd.

Tað er tí løgið, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin taka sær heiðurin av hesi góðu loysnini.

Vikuskifti

Nr. 223 • leygardagur • 17. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Revsaður fyri at flenna at Mao

- Í Kina ræður um at kenna røttu fólkini, skalt tú avgreiða eitthvørt, og ikki minst, um tú kemur tær í trupulleikar, sigur Xioabin Zhang, matstovueigari.

Saman við føroysku konu síni, Lindu, og teirra fýra børnum, býr hann í Havn, har tey reka matstovuna Nantong

Lesið á síðu 4 og 5



Niðurteljingin er byrjað:

# 6 dagar til Harry Potter

**Bøkurnar um Harry Potter hava bergtikið børn um allan heim. Eisini í Føroyum hava børn fingið blóð uppá tonnina, hvat Harry Potter viðvíkur. Um seks dagar verður filmurin "Harry Potter og vitramannasteinurin" frumframsýndur í Havnar Bio, og fyrr í vikuni vóru longu meiri enn 100 atgongumerki seld í forsølu**



*- Harry Potter ger tað, sum man ikki sleppur, brýtur reglar, og hetta ger, at tú verður spentur sjálvur, siga Sigrið Dalsgarð og Bergur Dam, bæði 11 ár.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LESIHUGUR
*Ingrid Bjarnastein*

Trímenningarnir Bergur Dam, 11 ár úr Havn, og Sigrið Dalsgarð, 11 ár av Velbastað, eru tvey, sum longu hava tryggjað sær pláss til sýningarnar av Harry Potter.

Filmurin »Harry Potter og vitramannasteinurin« varð frumframsýndur í USA og teimum stóru býunum í Evropa í gjár, men í Danmark, Føroyum og øðrum smærri londum í Evropa verður hann ikki frumframsýndur fyrr enn fríggjadagin 23. november.

Graml hevur verið um, at filmurin fór at hava aldursmark í Føroyum. Í Havnar Bio verður sagt, at aldursmarkið verður antin 7 ella 12 ár, men hetta er ikki fastlagt enn.

Men hvat so við Bergi og Sigrið um filmurin fær 12 ára aldursmark?

– Vit sleppa inn hóast alt, tí mamma kemur við, siga tey bæði við einum smíli.

– Eg giti, at hesin fyrsti filmurin fer at vera tann besti, og tann, sum fer at fáa mest pening, sigur Bergur.

Skrivaðar eru sjey bøkur um Harry Potter. Fýra av teimum eru umsettar til danskt, meðan enn eru bert tvær umsettar til føroyskt. Triðja føroyska umsetingin kemur tann 23. november – sama dag sum frumframsýningin av filminum.

Bergur og Sigrið hava bæði lisið fýra bøkur um Harry Potter. Sigrið lesur allar bøkurnar á donskum, meðan Bergur lesur tær bæði á føroyskum, donskum og enskum.

## Hvør er so Harry Potter?

– Harry Potter er ein gandakallur, sum er 11 ár í tí fyrstu bókini. Síðani verður hann eitt ár eldri fyri hvørja bók, greiða tey frá.

– Hann fer á ein gandaskúla í 5. flokki. Tað er ein gandaskúli fyri galdraskap. Hann er ikki ein vanligur gandakallur, tí hann hevur gjørt soleiðis, at tann størsti gandakallurin fyri svørtum gandi er fallin.

Men hvat er tað, sum ger, at Harry Potter fær fleiri 1000 børn kring heimin at sita still og stara í eina bók?

– Harry ger tað, sum man ikki sleppur, fortelja trímenningarnir víðari.

– Hann brýtur reglar, og hetta ger, at tú verður spentur sjálvur. Harry er spennandi og ger nógv spennandi ting. Til dømis tosar hann við slangur.

Bergur og Sigrið lýsa Harry Potter sum: fittan, ymiskt dámdan av gandakallum, hevur fólk, sum dámar hann væl. Hann hevur rundar brillur og myrkagrøn eygu. Um man klippur alt hárið av honum, so er tað vaksið útaftur dagin eftir.

## Yvir 1700 síður

Spurd um, hvør bókin er tann besta, svara bæði, at tað ber als ikki til at avgera.

– Tær eru allar á hvør sín hátt, siga tey.

– Í tí fyrstu brýtur hann flest reglar, í tí næstu har kennir tú tað sum um, tú ert Harry Potter, í tí triðju fært tú mest at vita um hann, og í tí fjórðu er tað mest um Voldemort.

Tað er ikki bara sum at siga tað, at fara í holt við eina Harry Potter bók. Tvær tær fyrstu eru meiri enn 300 síður, tann triðja er umleið 400 og fjórða bókin telur nærum 700 síður.

Hetta vil so siga, at tilsamans hava tey lisið yvir 1700 síður um Harry Potter.

– Eg havi bara lisið bøkurnar einaferð, sigur Sigrið.

– Eg fekk ta fyrstu Harry Potter bókina í februar 1999, men eg byrjaði ikki at lesa hana fyrr enn í september sama ár, tí tá hoyrdi eg onnur fortelja, hvussu spennandi tær vóru.

Hinvegin hevur Bergur lisið sínar Harry Potter bøkur fleiri ferðir.

– Fimta Harry Potter bókin kemur ikki fyrr enn í februar mánaða næsta ár, so eg lesi tær umaftur meðan eg bíði.

Bergur og Sigrið gleða seg ógvuliga nógv til filmin, og hava tey tryggjað sær tey bestu plássini, tá filmurin kemur – aftast, mitt fyri.